

*Óli Breckmann smílist – hinir á myndini eru allir landsstýriskandidátar: Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum. Bill Justinussen er upplagt boð hjá Miðflokkinum til landsstýrismann í heilsumálum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

ingssamband millum tey ymsu plássini í Føroyum. Samgongan ásannar, at ferða- og flutningssamband hevur týdning fyri vinnumøguleikar og trivna í landinum.

Raðfesting av íløgum á samferðsluøkinum verður framd sambært fíggjar- og búskap-ar--orku landsins.

Umstøður teirra rørslutarnaðu verða raðfestar høgt, tá ið nýíløgur/ábøtur í samferðslu-skip-anini verða gjørdar.

Kannað verður, um rationaliseringar kunnu gerast í samferðslukervinum.

Uppgávur kunnu bjóðast út til privatar at røkja, har hetta gevur fíggjarligan og tænastuligan fyrimun.

Landsverkfrøðingurin ger kanningar um framtíðar sambindingar oyggjanna millum.

Játtaður verður framhaldandi stuðul til infrakervið á útoyggjunum.

Kannað verður um Postverkið og Strandferðslan kunnu samskipa post- og farma-flutningin.

Skaptar verða javnbjóðis fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum. Miðað verður eftir at menna netsamfelagið Føroyar.

Tað almenna eigur at ganga á odda at nýta kunningartøkni frá føroyskum fyritøkum.

Møguleikarnir fyri loftvegis samferðslu millum oyggjarnar verða kannaðir.

### Orkumál

Orðaður verður almennur orkupolitikkur.

Stórur partur av landsins inntøkum verður nýttur til orku á sjógvi og landi. Tí er umráðandi, at ein langsiktaður orkupolitikkur verður førdur, sum í mest møguligan mun ger okkum óheft av termiskari orku - t.v.s. olju.

Kanningar verða framhaldandi gjørdar í vatn-, vind-, aldu- o.a. náttúrugivnar orkukeldur.

### Arbeiðsmarknaðarmál

Saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum verður arbeitt við at gera skipan, sum kann loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum so skjótt, tær koma í.

Nýggj eftirlønarskipan fyri øll skal avgreiðast beinanvegin.

Rætturin til barnsburðarfarloyvi verður longdur til 52 vikur, og endurgjald fyri mista inntøku stigvíst víðkað at galda alt tíðarskeiðið.

Møguleikar fyri, at almennir stovnar skipa fyri barnaansing, verða kannaðir.

Arbeiðsskaðatryggingarlógin verður løgd fyri tingið av nýggjum.

Saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum verður ALS-skipanin eftirmett og dagførd.

### Oljuvinna

Kolvetnispolitikkurin verður framhaldandi grundaður á greiðan skilnað millum almennar og privatar uppgávur.

Ojufeløgini gera íløgur í leiting og møguliga framleiðslu, men virka eftir skipaðum karmum, ið tað almenna hevur sett. Myndugleikarnir hava neyvt eftirlit við virksem-inum hjá oljufeløgum, ið eru virkin á føroyska landgrunninum.

Um kolvetni í rakstrarverdum nøgdum eru í havbotninum, verður dentur lagdur á at tryggja eina varliga og skynsema framleiðslutilgongd, har atlit verða tikin at búskapi, umhvørvi og mentan.

Dentur verður lagdur á, at føroyskar fyritøkur eru við í leitivirkseminum á landgrunninum, so at kolvetnisleiting stimbrar teirra førleika at gera seg galdandi í oljuvinnu uttanlands.

Trivnaðar-, mentanar- og umhvørvisatlit verða raðfest ovarlaga.

Almennar inntøkur frá kolvetniskatti fara í serligan grunn.

### Útbúgving og gransking

Miðvísar íløgur í vitan, kunnleika og skapandi evnir eru neyðugar í føroyska samfelagnum komandi árini.

### Fólkaskúlin

Fólkaskúlin byggir á kristna siðalæru og føroyska mentan.

Fólkaskúlalógin skal eftirmetast, og læraraútbúgvingin endurskoðast og samskipast við hægri lesnað. Eftirútbúgvingin av fólkaskúlalærarunum skal fjøltáttast.

Foreldragjaldið til frískúlar skal lækka.

Eftirmetingin av frálæruni í fólkaskúlanum skal styrkjast.

Serundirvísingin og virksemið á Sernámsdeplinum skal endurskoðast.

### Miðnám

Vinnuskúlarnir skulu styrkjast til nýggjar avbjóðingar á tekniska økinum á arbeiðsmarknaðinum og til lærugreinir, sum eru neyðugar í eini komandi oljuvinnu.

Íløgur verða gjørdar í miðnámsskúlarnar, so hesir lúka tey krøv, sum nútíðarsam-felagið setur. Møguleikarnir at skipa miðnámsskúlarnar til breytaskipan verða kannaðir.

Kannað verður, um møguligt er at veita stuðul til útbúgvingar uttan fyri Føroyar, sum í dag ikki verða stuðlaðir av Stuðulsstovninum ella SU.

Nýggjur tekniskur skúli og studentaskúli verða bygdir í Tórshavn

Hølistrupulleikarnir hjá HT-útbúgvingini í Klaksvík verða loystir sambært útbyggingarætlanini.

### Hægri lestur

Fróðskaparsetrið skal hava hóskandi karmar og hava møguleikar at geva fleiri útbúgvingartilboð.

Útbyggingarætlan fyri Fróðskaparsetrið verður kannað.

Útbúgvingarnar, sum liggja millum miðnám og hægri lesnað, verða umskipaðar til hægru útbúgving-arnar.

Virkað verður fyri, at útbúgvingarmøguleikarnir hjá føroyskum lesandi úti í heimi verða støðugt styrktir

### Mentan

Mentan og list eru týðandi fyri trivnað og samfelagsliga menning.

Samgongan vil í mest møguligan mun stuðla tí týðandi sjálvbodna arbeiði, sum ítróttarfeløg, skótar, einstaklingar o.o. ítrivsfeløg gera til at menna okkara børn og ungdóm.

Miðað verður eftir at fremja tilmælini í mentanarálitinum.

Møguleikarnir fyri at seta á stovn mentanarhús kring landið verða bøttir.

Bókasavnsskipanin eigur at verða ment um alt landð, so hon kann veita øllum borgarum holla og dygga tænastu.

Fyrireikingar til Tjóðleikpall Føroya byrja.

Greiður fornminnapolitikkur verður orðaður og settur í verk.

Orðabókaútgáva úr og í fremmand mál verður stuðlað, harundir teldutøkar orðabøkur.

Í loftmiðlunum verður føroyska tilfarið styrkt, og tilboð til deyv og tunghoyrd økt. Byrgt eigur at verða upp fyri harðskapi og siðspillu.

Útgáva av føroyskum teldutøkum blindamáli verður framd.

Sjónvarpið og Útvarpið skulu skipast sum sjálvstøðugir almennir stovnar.

Upphavsrættindi hjá listarfólki skulu fáast í rættlag. Samsýningar fyri orð og løg í sambandi við nýggjar útgávur skulu umsitast av føroyskum stovni.

Tað ræður um at stuðla øllum tí, sum fremur føroyskan samleika á mentunarliga økinum, eitt nú yrkislist, fólkamentan, virksemi í kvøldskúlum, kirkjum og samkomum og frítíðarfelagsskapum.

### Umhvørvismál

Umhvørvispolitikkurin og -fyrisitingin verða styrkt. Hetta skal m.a. gerast við at samskipa fyrisitingina av umhvørvisvernd, náttúruvernd og lendisnýtslu.

Meginreglan skal vera, at burturbeining og umhvørvisvernd áliggur tí dálkandi partinum.

Umhvørvis-, náttúru- og planleggingarlóggávan verður endurskoðað og dagførd. Skipanin við umhvørvisgóðkenningum av virkjum og fyritøkum verður gjørd einfaldari, soleiðis at tað almenna setir umhvørvismál, men einstaka fyritøkan fær frælsi at velja, hvussu málini verða nádd.

Upplýsing og tiltøk til náttúru- og umhvørvisvernd verða stuðlað.

Føroyar skulu taka lut í altjóða samstarvi við atliti at felags átøkum, ið minka um dálkingina, menna umhvørvisverndina og økja um burðardygdina.



Búskapur og vinna:

## Fleiri mugu til arbeiðis

Vandi er fyri, at Danmark fær lítið og einki burtur úr framburðinum í altjóða búskapinum. Tað heldur í hvussu er tjóðbankin.

Í einari frágreiðing frá tjóðbankanum verður víst á, at arbeiðsloysið í Danmark er umleið fimm prosent, og at tað verður sera trupult at økja arbeiðsmegina, tá framburðurin í búskapinum fer at vísa seg.

– Arbeiðsloysið er ikki broytt í ár, og tí er lítið út at geva. Tí er vandi fyri, at Danmark fær ikki ágóða av búskaparliga framburðinum, uttan so at tað eydnast at økja arbeiðsmegina. Hetta síðsta eigur tí at verða tann avgerandi málsetningurin í komandi árum, stendur í frágreiðingini hjá tjóðbankanum.

Tjóðbankin mælir tí til tiltøk, sum kunnu fáa ein part av teimum arbeiðsleysu út á arbeiðsmarknaðin. Men tað er ikki nóg mikið, og tí verður eisini neyðugt at bera so í bandi, at fólk arbeiða longur enn nú. Her verður bæði hugsað um tann einstaka arbeiðsdagin og um arbeiðslívið hjá tí einstaka.

Í frágreiðingini nemur tjóðbankin eisini við lønarlagið í Danmark. Sagt verður, at lønarvøksturin í Danmark var 4,4 prosent í fjør, og at tað er oman fyri vøksturin í hinum vesturevropeisku londunum.

## Minni eftirlit

Kanningar í Noregi vísa, at tey, sum lata sjálvuppgávuna inn ígjøgnum internetið, eru í minni vanda fyri at verða avdúkað, hava tey gjørt okkurt skeivt. Tað vísir seg, at skattavaldið ger minni burtur úr at kanna hesar sjálvuppgávurnar enn tær vanligu á pappíri.

UTTAN ÚR HEIMI

# Pearl fekk ein son

**Einkjan eftir tann myrda amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl hevur fingið ein son.**

PEARL-MÁLIÐ

*Árni Joensen*

Amerikanski tíðindamaðurin Daniel Pearl, sum varð myrdur í Pakistan í januar, er vorðin pápi – post mortem. Einkjan, sum eitur Mariana, hevur nú fingið ein son.

Daniel Pearl hvarv í pakistanska býnum Karachi tann 23. januar. Hann var komin hagar sum tíðindamaður hjá amerikanska blaðnum Wall Street Journal og skuldi royna at fáa samband við umboð hjá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda hjá Osama bin Laden.

Seinni fekk amerikanska sendistovan í Karachi eitt sjónband, sum vísti, at Daniel Pearl varð tikin av døgum.

Skyldfólk hjá Pearl siga, at tann lítli drongurin skal eita Adam.



*Mariana og sonurin avmyndað á einari føðideild í París*

*Mynd: Reuter*

# Bush ávarar Pakistan

**Amerikanski forsetin, George W. Bush, ávarar nú Pakistan og krevur, at landið ger sítt til at steðga muslimsku uppreistrarmonnunum í Kashmir.**

KASHMIR-STRÍÐIÐ

*Árni Joensen*

Amerikanska stjórnin kunngjørdi hósdagin, at hon fer at senda Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra til India og Pakistan, har hann skal royna at linna spenningin millum tey bæði londini.

Tað var George W. Bush, forseti, sum boðaði frá, at verjumálaráðharrin skal royna seg sum semingsmann. Samstundis gjørdi Bush greitt, at pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, sum hevur verið ein av trúgvastu stuðlunum hjá USA í krígnum í Afghanistan, eigur at leggja størri dent á at loysa kreppuna um Kashmir.

– Hann skal steðga álopunum. Tað eigur hann at gera, tí hann hevur lovað at gera tað, segði Bush.

Áheitanin hjá Bush kom, stutt eftir at pakistanski forsetin hevði boðað frá, at herurin er farin undir at flyta hermenn frá afghanska markinum eystur til indiska markið. Samstundis frættist, at vápnaðir uppreistrarmenn høvdu beint fyri trimum indiskum løgreglumonnum.

Eygleiðarar halda, at avgerðin hjá Pakistan at flyta hermenn frá afghanska markinum kemur amerikanarum illa við, tí júst teir pakistansku hermenninir hava forðað monnum hjá Taliban og al-Qaeda at ferðast aftur og fram um markið.

Amerikanska uttanríkisráðið hevur boðað frá, at tað er farið undir at fyrireika eina sokallaða luftbrúgv, soteir umleið 60.000 amerikansku ríkisborgararnir í India og Pakistan kunnu flytast burtur haðani, skuldi tað verið neyðugt.

Úr Norðurlondum:

## Uttan fyri hjúnarlag

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verða flestu børn í Noregi nú fødd uttan fyri hjúnarlag, vísa tøl hjá norsku hagstovuni.

Hagtølini vísa, at 42 prosent av teimum føddu børnunum høvdu foreldur, sum búðu saman uttan at vera gift. Einligar mammur fingu átta prosent av børnunum. Hagtølini vísa eisini, at av teimum kvinnunum, sum fingu sítt fyrsta barn, vóru bara 35 prosent giftar.

## Kravmiklir læknar

Læknarnir á sjúkrahúsunum í Århus hótta nú við at beina fyri ætlanini hjá stjórnini um at fáa fleiri sjúklingar viðgjørdar á donsku sjúkrahúsunum. Eftir ætlanini skulu læknarnir arbeiða meiri enn nú, men í Århus krevja læknarnir at fáa 1500 krónur um tíman, skulu teir arbeiða eyka. Tað er meiri, enn myndugleikarnir vilja lata. Myndugleikarnir siga seg vera til reiðar at lata læknunum 100 prosent oman á ta vanligu lønina.

Sjúkrasystrarnar hava kravt at fáa 420 krónur um tíman, skulu tær arbeiða eyka, men myndugleikarnir vilja ikki lata teimum meiri enn 360 krónur.

Heilsumálaráðharrin harmast støðuna hjá læknunum og sjúkrasystrunum. Hann sigur, at hendir einki, noyðast fólk at fara á tey privatu sjúkrahúsini ella av landinum at fáa viðgerð. Stjórnin hevur annars játtað sjúkrahúsunum hálva aðru milliard krónur eyka fyri at stytta bíðilistarnar í sjúkrahúsverkinum, men við lønarkravinum hjá læknunum og sjúkrasystrunum er vandi fyri, at ætlanin miseydnast.

## Í august

Danska stjórnin hevur nú boðað frá, at danir sleppa at keypa øl og sodavatn í dunkum frá 24. august. ES-reglur hava gjørt, at dunkarnir eru seinkaðir tveir mánaðir.